# Fróðskaparsetur Føroya
# University of the Faroe Islands

## Søgu- og samfelagsdeildin
## Department of History and Social Sciences

### Ph.d.-skeið/ PhD course

### Heyst/Autumn 2021

| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar/ Course number** | 6322.21 |
| **Heiti**<br><br>**Title** | Refleksivitetur í gransking: Ph.d verkstova um sambond í feltarbeiði og háttalagslig umhugsan<br><br>Reflexivity in research: PhD workshop on field relations and methodological reflections |
| **ECTS námsstig**<br><br>**ECTS** | 2 (+1 eyka, um eftirumhugsanargrein verður latin inn eftir skeiðið)<br><br>2 (+1 extra if post-reflection paper is submitted after the course) |
| **Fortreytir**<br><br>**Prerequisites** | Ph.d.-lesandi og masterlesandi, sum hava ætlanir um ella eru farin undir at fyrireika eina ph.d.-verkætlan í samfelagsvísindum ella hugvísindum. Lesandi skulu hava lokið masternám ella vera um at koma á mál við náminum. Lesandi skulu lata inn tríggjar síður av undanumhugsni.<br><br>PhD students or Master's students contemplating or preparing a PhD project in the fields of social sciences or humanities. Students must have completed a Master's degree or be at the late stage of their Master's education. Students are required to submit a 3 page pre-reflection paper |
| **Stig**<br><br>**Level** | ph.d.<br><br>PhD |
| **Endamál** | Endamálið við skeiðnum er, við at kjakast um bókmentir, við fyrilestrum og við egnari umhugsan um viðurskifti á økinum, at vísa á og kjakast um týdningin av refleksiviteti, bæði tá ið úrslit av arbeiði á økinum skal leggjast til rættis, útinnast ella greinast. Vit leggja dent á at vísa, at granskarar ongantíð bara kunnu vera "flugan á vegginum" í feltarbeiði. Tá ið henda fortreytin fyri feltarbeiði er góðkend, er endamálið við skeiðnum at skilja, hvussu tílíkt tilvit um tína egnu støðu í feltinum kann hugsast inn í samlaðu granskingargongdina, frá sniðgeving av kanningini, innsavning av tilfari, greining og at enda miðlan av úrslitunum.<br><br>The purpose of the course is – through discussions of readings, lectures, and own reflections on field relations – to illustrate and |

<table>
<tr><td>Purpose</td><td>discuss how reflexivity is important in both planning, executing, and analysing the results of engagements with the field. We focus on how researchers can never be simply ‘flies on the wall’ during fieldwork. Accepting this as a premise for doing fieldwork, the purpose of the course is to understand how such consciousness about own positions in the field can be thought into the entire research process, from research design, data collection, analyses, and subsequent presentation of results.</td></tr>
<tr><td>Innihald<br><br>Content</td><td>Skeiðið fevnir um hesi høvuðsevni:<ul><li>At kanna sambandið millum ítøkiligu feltarbeiðinum og meira úrtøkiligu ástøðiligu og háttlagsligu hugsanirnar.</li><li>At viðgera spurningar hjá einstøku skeiðsluttakarunum og egnu støðu teirra í mun til luttakarar í kanningum, og hvussu háttalagslig umhugsan skapar fortreytir fyri at framleiða kvalitativt tilfar.</li><li>At kanna, hvussu vit sum einstaklingar hava okkara egnu serstøku støðu í mun til evnini, sum verða kannað, og økini, sum spurt verður um.</li><li>At kjakast um, hvat ein etisk haldbar kanning er, og hvussu komast kann fram til greiningarúrslit, sum eru viðkomandi fyri fólkini ella stovnarnar, hvørs veruleiki verður kannaður.</li><li>At kjakast um og umhugsa, hvussu sambond kunnu flyta seg ella broytast gjøgnum kanningargongdina, hvussu sambond í feltarbeiði kunnu skipast, og hvussu arbeiðast kann við teimum gjøgnum kanningargongdina.</li></ul><br>The course comprises the following main topics:<ul><li>Examining the link between concrete fieldwork and more abstract theoretical and methodological assumptions.</li><li>Addressing questions of individual course participant’s own position vis-à-vis research participants and how methodological reflections establish the premises for producing qualitative material.</li><li>Examining how we are individually positioned in relation to research subjects and fields of inquiry.</li><li>Discussing ethically sound research and reaching analytic conclusions of relevancy for the people and organisations whose realities are being investigated.</li><li>Discussing and reflecting on how relational positionalities might slide or change during the research process and how field relations can be systematically approached and worked with through the research process.</li></ul></td></tr>
<tr><td>Læru- og undirvísingarhættir<br><br>Learning and teaching approaches</td><td>Skeiðið er skipað sum verkstova. Tað merkir, at luttakarar skulu leggja fram og kjakast um framløgur hjá øðrum luttakarum. Harumframt fevnir skeiðið um nakrar stuttar fyrilestrar um refleksivitet og feltstøður, sum eru ætlaðir til íblásturs. Luttakarar skulu lata inn tríggjar síður við undanumhugsni, áðrenn skeiðið byrjar. Tær hugsanirnar verða nýttar til at seta saman bólkar, sum skulu gera bólkaarbeiði á verkstovuni.<br><br>The course has a workshop format, which means that participants will be required to present and discuss each other’s work. In addition, the</td></tr>
</table>

| | |
|---|---|
| | course consists of a few brief inspirational lectures on reflexivity and field positions. Participants are required to submit a pre-reflection paper of max 3 pages, prior to course commencement. Based on pre-reflection papers, groups are formed for group work during the workshop. |
| **Læruúrtøka**<br><br><br><br><br><br><br><br><br><br><br><br><br><br>**Learning outcomes** | Tá skeiðið er lokið, skal tann lesandi verður før/-ur fyri at:<br>• Lýsa og meta um fortreytirnar fyri at gera kvalitativt feltarbeiði og serliga umhugsa kritiskt, hvørja ávirkan tað hevur, at granskarin hevur samband við feltið.<br>• Staðfesta og reflektera um sambond millum háttalagsligu og ástøðiligu karmarnar, sum arbeitt verður við<br>• Meta um sína egnu støðu í sambandi við granskingarluttakarar og hugsa um, hvussu hetta samband ávirkar ítøkiliga feltarbeiðið.<br>• Greiða frá og kjakast um, hvussu egnar háttalagsligar umhugsanir skapa fortreytirnar fyri at framleiða kvalitativt tilfar<br>• Greiða frá og kjakast um etisku síðurnar av háttalagnum og framleiðsluna av vísindaligari/akademiskari vitan í heila tikið.<br><br>On completion of the course, students can demonstrate ability to:<br>• Describe and assess the premises for doing qualitative fieldwork, and in particular reflect critically on the effects of researcher engagement with the field.<br>• Identify and reflect on the links between their methodological and theoretical frameworks<br>• Assess their own position vis-à-vis their research participants and reflect on how this relationship impacts concrete fieldwork<br>• Explain and discuss how their methodological reflections establish the premises for producing qualitative material<br>• Explain and discuss the ethical dimensions of methodology and the production of scientific/academic knowledge in general. |
| **Próvtøkuháttur**<br><br><br><br><br><br>**Assessment methods** | Virkin luttøka og munnlig framløga av undanumhugsanargrein. Valmøguleiki: Eftir at verkstovan er liðug, kunnu luttakararnir lata eina eftirumhugsanargrein inn (5-10 síður), har greitt verður frá háttalagsligum hugsanum í sambandi við sína ph.d.-verkætlan. Evstamark at lata inn slíka grein er tvær vikur eftir skeiðið, og ein av undirvísarunum á skeiðnum fer at geva eina skrivliga eftirmeting.<br><br>Active participation and oral presentation of pre-reflection paper. Optional: After the workshop, participants are invited to submit a 'post-reflection paper' (5-10 pages) outlining methodological considerations for their PhD thesis. Deadline for submission will be two weeks after the course and written feedback will be provided by one of the course lecturers. |
| **Próvdøming**<br><br>**Examination** | Innanhýsis<br><br>Internal examination |
| **Próvtalsstigi** | Staðið / ikki staðið |

| | |
|---|---|
| **Grading scale** | Pass / Fail |
| **Lestrarlisti**<br><br>**Bibliography** | Bókmentalisti verður útflýggjaður, áðrenn skeiðið byrjar.<br><br>Bibliography will be made available prior to course commencement. |
| **Ábyrgd / Contact** | Erika Anne Hayfield |